Tí skal fólk Mítt læra navn Mítt at kenna; tí skal tað tann dag læra at kenna, at Eg eri tann, ið sigur: „Hygg, her eri Eg!“ Es. 52,6.
Fyri góðum tveimum mánaðum síðani, skuldi eg undir eina skurðviðgerð, og eg visti væl, at bara tað, at mann skal í fulla narkosu nakrar tímar ger, at mann ikki er væl fyri teir næstu dagarnar.

Sunnudagin áðrenn skurðviðgerðina var breyðbróting í Filadelfia, og tá eg henda morgun tók av breyðinum og kalikinum, minti eg Harran á skurðviðgerðina seinni í vikuni.

Eg fór undir skurð ein hósmorgun, og hevði fyrireikað meg uppá, at eg í minsta lagi tær næstu tvær vikurnar, helst einki skuldi gera. Eg fór til songar hóskvøld, og hevði nakað av pínu, og sovnaði eitt sindur seint. Fríggjamorgun vaknaði eg áðrenn kl. 07.00 og føldi meg púra fríska, so eg gjørdi meg klára at fara heim. Læknin kom tann morgunin áðrenn kl. 08.00 og segði, at eg gott kundi fara heim, men hann gav mær eina sjúkramelding á 14 dagar, og bað meg taka tað róligt hesar báðar vikurnar. Eg føldi meg púra fríska, og longu sunnumorgun var eg á møti í Skopun, og havi eg verið púra frísk síðan, so ja Gud ger undur enn í dag, og tað alt snýr seg um er, at vit síggja Hansara náði í øllum tí vit uppliva.

Eg veit, at eg føldi meg meiri fríska enn eg kann minnast í langa tíð, og er tað bara eitt undur, ið kann gera tað. So ja Gud ger undur í dag, og eri eg spent og síggi fram til, hvat liggur fyri framman í 2025. *ÁO*

Logos Bróstsukur

Vit hava síðani 1. febr. 2023 gjørt vælsmakkandi Logos bróstsukrini, har ágóðin av søluni fer óskerdur til missión. Vit møtast 8.-10 fólk fyrsta leygardag í hvørjum mánaði og framleiða vit vanliga 700.-800 pakkar hvørja ferð. Vit høvdu tí verið sera fegin, um fleiri høvdu áhuga at hjálpa til fyrsta leygardag í hvørjum mánaði. Tú sum hevur áhuga í hesum, kanst ringja ella skriva til Sonna Djurhuus og melda teg til.

Tað eru 3 fyritøkur, sum keypa bróstsukrini frá okkum og eru tær: Inn v/Jaspur og Janu, Jysk og SSL (Smyril). Sølan hevur gingið so mikið væl, at vit hava 138.000 kr tøkar at luta út til missión. Hetta er einastandandi og takka vit Gudi fyri hesa signing, vit kunnu geva víðari.

Í samband við útlutanina av peningi til missión, er tørvur á fólki at vera í missiónsnevndini, sum skal játta peningin til missión. Tað skulu vera 3 fólk í hesi nevndini og vilja vit fegin, at tú sum brennur fyri missión og kundi hugsað tær at verið við í hesum arbeiði, bjóðar teg fram til at vera í hesi nevnd. Tað gera tit við at ringja til Sonna Djurhuus á tlfnr: 212084 ella at skriva til sonnidj@yahoo.com.

Vegna Logos Bróstsukur
Sonni Djurhuus

Filadelfia

„Himmal á jørð“

2025 eitt fagnaðarár

Á bønarmøtinum 6. januar var spurningurin settur: „hvat síggja vit fyri 2025“

Nógv kom fram og alt varð skrivað niður, so vit seinni aftur kunnu hyggja at hesum – sera spennandi.

Fyri mítt viðkomandi biði eg eftir, at 2025 skal vera eitt fagnaðarár.

Á møtinum 22. des. 2024 kom eitt profetiskt orð frá einum av okkara ungu, sum segði millum annað, at „leinkjur skulu brotna“, og tað segði ja og amen í mínum hjarta.

Sum dagarnir gingu, bað eg nógv yvir hesum, og bleiv sera glað og spent fyri 2025 og hugsaði, at árið 2025 skal vera eitt fagnaðarár.

Fyrst í nýggja árinum hoyrdi eg í útvarpinum, at innan katólsku kirkjuna er árið 2025 rópt at vera eitt fagnaðarár.

Fagnaðarár hjá jødunum var 50sins tjúgunda hvørt ár. Tá skuldi alt leyslatast, trælir loysast og ognir latast aftur.

Tað er júst tað vit ynskja og biðja eftir, at menniskju skulu setast í frælsi,

frælsi frá ótta, frælsi frá bundinskapi, frælsi frá sjúkum, frælsi frá tunglyndi, frælsi yvir alt okkara fólk.

Eg vil gleðast og dansa
Harrans Andi er nú yvir mær.
Fara út at boða frælsi fyri fangum
og kunngera Harrans fagnaðarár,
nú Hann leiðir meg á sigursferð.
Eitt Harrans fólk,
hin livandi Guds familja
Heimsins salt og heimsins ljós
Hin sovandi kappi vaknar nú
og reisist á okkara jørð.

Lat okkum reisast og fara út og boða frælsi yvir land og fólk okkara.

Conny Háskor

FEBRUAR 2025

Leygardagur	1.		Reingerð: Áshild og co.
Sunnudagur	2.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Kári, David og Nora Ábyrgd/Leiðari: Mariann Lovsongsleiðari: Nomi. bólkur II Uppvørpa: Ása Elisabeth Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Einar Joensen Kaffivertar: Kári, David og Nora
Mánadagur	3.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Ása O. Lovsongsleiðari:
Mikudagur	5.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	8.		**Reingerð:** Mariann og co.
Sunnudagur	9.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Fríðbjørn og Leif Ábyrgd/leiðari: Anfinn Norðfoss Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Tummas J. Kaffivertar: Fríðbjørn og Leif
Mánadagur	10.	Kl. 19.30	**Felagsbøn í Lívsins Orð, Saltangará** Ábyrgd/leiðari: Lívsins Orð
Mikudagur	12.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
		Kl. 18.30	**Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Leygardagur	15.		**Reingerð:** Margreth og co.
Sunnudagur	16.	Kl. 11.00	**Morgunmøti v. breyðbróting og innsavnan til húsið**
		Kl. 11.30	**Barnamøti** Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild Ábyrgd/leiðari: Marner Lovsongsleiðari: Tummas, bólkur II Uppvørpa: Jóel Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Sam Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild
Mánadagur	17.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Anna-May Lovsongsleiðari:
Mikudagur	19.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	22.		**Reingerð:** No-omi og co.
Sunnudagur	23.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner Ábyrgd/Leiðari: Anna-May Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Mariann Kaffivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner
Mánadagur	24.	Kl. 20.00	**Lovprísan og forbøn** Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur Lovsongsleiðari:
Mikudagur	26.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
		Kl. 18.30	**Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Hósdagur	27.	Kl. 20.00	**Hugni fyri kvinnur og gentur** Ábyrgd: Margreth og Linda

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

Samkomuleiðslubólkurin